## Framvegis vón hjá Atla

Orsaka av truplu støðuni hjá Frem í botninum í næstbestu donsku fótbóltsdeildini var Atli Danielsen ikki við í landsdystinum í Estlandi mikukvøldið. Í gjárkvøldið var Atli Danielsen á Frem liðnum, sum vitjaði í Køge, har Henrik Larsen er venjari, og har nýggi landsliðsspælarin, Jónas Þór Næs, er millum spælararnar. Úrslitið var málleysur javnleikur. Tað ber við sær, at bæði Frem og Køge eru omanfyri strikuna, og at bæði liðini eru í vanda at enda niðanfyri strikuna eftir síðsta umfar, sum verður sunnudagin. Trý lið flyta niður. HIK er triði aftast við 30 stigum, ið er sama stigatal, sum LFA og Frem hava. Køge er omanfyri hesi bæði við 32 stigum.



## City vil hava Ronaldinho

Thailendski Thaksin Shinawatra hevur stórar ætlanir við Manchester City, og hann er eisini til reiðar at rinda tað, sum ætlanirnar kosta. Nú sigur hann alment, at gongst sum ætlað verður Ronaldinho millum spælararnar, sum komandi kappingarár spæla í felagnum. Mark Hughes er júst settur í venjarasessin hjá felagnum, og sambært leiðsluni er Hughes sannførdur um, at Ronaldinho er ein góður styrkur at fáa.




*Í komandi viku fer kvinnuliðið hjá Støkk til Kanada, har HM-kappingin í estetiskum fimleiki verður hildin*

# Støkk til HM í Kanada

**Kvinnuliðið hjá Støkk í estetiskum fimleiki luttekur í World Championship í Kanada 13. og 14. juni**

FIMLEIKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Hetta er fjórða árið á rað at kvinnurnar hjá Støkk luttaka í World Championship í estetiskum fimleiki og hesaferð gongur leiðin til Kanada. Hetta er nýggjinda ferð, at hendan heimsmeistarakapping verður fyriskipað, og fyrstu ferð at hon verður hildin uttan fyri Evropa.

Kappingin verður fríggjadagin og leygardagin 13. og 14. juni. Við í HM kappingini eru 28 lið úr 14 ymiskum londum. Umleið 400 fimleikarar, dómarar og venjarar úr Eysturíki, Bulgaria, Kekkia, Danmark, El Salvador, Estlandi, Føroyum, Finnlandi, Ruslandi, Spania, Turkalandi, USA, Ukraine og vertslandinum Kanada, luttaka í stóra fimleikatiltakinum.

Støkk hevur góðar vónir til at menna seg í kappingini, og fer at royna sítt allar besta fyri at betra um síni úrslit.

Ferðalagið hjá Støkk telur 12 fólk og farið verður av landinum mánadagin 9. juni, fyrst til Ísland og síðan víðari til Kanada mikudagin 11. juni. Í Íslandi fara Støkk kvinnurnar at venja og sýna fram estetiskan fimleik fyri fimleikafelagnum Gerpla úr Kópavági. So samanumtikið kann sigast at túrurin verður sera spennandi og læruríkur. Komið verður aftur til Føroyar mánadagin 16. juni.

Eingin túrur uttan stuðlar. Kvinnuliðið ynskir at takka teimum, sum hava stuðlað ferðini: Norðoya Sparikassi, Bakkafrost, Eysturoyar Teoriskúli, Fonn Flog, JT-Kaving og Statoil.

## Dystir um vikuskiftið

### Formula-deildin

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 08.06 | KÍ-Skála | Ransin N. Djurhuus |
| 08.06 | ÍF-NSÍ | Petur Reinert |
| 08.06 | B71-HB | Jens P. Brattalíð |
| 08.06 | B36-Víkingur | Dagfinn Olsen |
| 09.06 | B68-EB/S | Eiler Rasmussen |

### 1. deild

| | | |
|---|---|---|
| 07.06 | AB-07 Vestur | Georg Rasmussen |
| 07.06 | HB-NSÍ | Høgni Hansen |
| 07.06 | KÍ-VB/S | Rúni Gaardbo |
| 07.06 | B68-Víkingur | Andrew Christiansen |
| 07.06 | EB/S-HB | Jan Skoradal |

### 2. deild

| | | |
|---|---|---|
| 08.06 | AB-Skála | Milan Cimburovic |
| 08.06 | B36-MB | Johan P. Michelsen |
| 08.06 | Fram-KÍ | Thomas J. Thomsen |
| 08.06 | Víkingur-ÍF | Alex Troleis |
| 08.06 | 07 Vestur-TB | Vinjard Dam |

### Kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 08.06 | Kí-Skála | Jákup M. Kjell |
| 08.06 | B36-AB | Sunniva Vesturtún |
| 08.06 | VB/S-Víkingur | Bibi |

### Steypafinalur

| | | |
|---|---|---|
| Smágentur, | | Niels L. Arge steypið |
| 07.06 | HB-KÍ | Elsa Andreasen |

### Smádreingir, Cadbury steypið

| | | |
|---|---|---|
| 07.06 | NSÍ-VB/TB | Bent T. Linklett |

### Gentur 14-17 ár, Mótasteypið

| | | |
|---|---|---|
| 07.06 | KÍ-B68/NSÍ | Sunnuvá Vesturdal |

### Dreingir, blaðberasteypið

| | | |
|---|---|---|
| 07.06 | HB-B36 | Dagfinn Olsen |

### EM-endaspælið

| Dagur | Kl | Dystur |
|---|---|---|
| 07.06 | 17.00 | Sveis-Kekkia |
| 07.06 | 19.45 | Portugal-Turkaland |
| 08.06 | 17.00 | Eysturríki-Kroatia |
| 08.06 | 19.45 | Týskland-Pólland |
| 09.06 | 17.00 | Rumenia-Frakland |
| 09.06 | 19.45 | Holland-Italia |

**Formula-deildin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 9 | 7 | - | 2 | - | 0 | 21 | 8 | 13 | 23 |
| 2 HB | 9 | 5 | - | 3 | - | 1 | 20 | 6 | 14 | 18 |
| 3 B36 | 9 | 4 | - | 4 | - | 1 | 11 | 5 | 6 | 16 |
| 4 Víkingur | 9 | 3 | - | 3 | - | 3 | 16 | 11 | 5 | 12 |
| 5 NSÍ | 9 | 3 | - | 3 | - | 3 | 11 | 13 | -2 | 12 |
| 6 B68 | 9 | 3 | - | 2 | - | 4 | 8 | 12 | -4 | 11 |
| 7 KÍ | 9 | 2 | - | 4 | - | 3 | 13 | 17 | -4 | 10 |
| 8 ÍF | 9 | 3 | - | 1 | - | 5 | 14 | 19 | -5 | 10 |
| 9 Skála | 9 | 1 | - | 3 | - | 5 | 7 | 18 | -11 | 6 |
| 10 B71 | 9 | 1 | - | 1 | - | 7 | 8 | 20 | -12 | 4 |

**1. deild**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB/S | 9 | 8 | - | 0 | - | 1 | 25 | 5 | 20 | 24 |
| 2 07 Vestur | 9 | 7 | - | 0 | - | 2 | 38 | 13 | 25 | 21 |
| 3 AB | 9 | 7 | - | 0 | - | 2 | 34 | 12 | 22 | 21 |
| 4 TB | 10 | 5 | - | 2 | - | 3 | 26 | 8 | 18 | 17 |
| 5 KÍ | 9 | 4 | - | 1 | - | 4 | 13 | 27 | -14 | 13 |
| 6 Víkingur | 9 | 3 | - | 3 | - | 3 | 10 | 22 | -12 | 12 |
| 7 HB | 10 | 3 | - | 2 | - | 5 | 17 | 12 | 5 | 11 |
| 8 EB/S | 10 | 3 | - | 0 | - | 7 | 11 | 38 | -27 | 9 |
| 9 NSÍ | 10 | 1 | - | 2 | - | 7 | 14 | 35 | -21 | 5 |
| 10 B68 | 9 | 1 | - | 0 | - | 8 | 9 | 25 | -16 | 3 |